# At samgongan kemur sær

**ÓTRYGGLEIKI** Fíggjarliga eru fyritíðarpensjónistar nógv verri fyri enn aðrir lønarbólkar, men verður nýggjasta ætlanin hjá samgonguni sett í verk, verður støðan uppaftur verri

Áki Bertholdsen

– Nú verða umstøðurnar hjá fyritíðarpensjónistum enn verri enn tær eru nú.

Tað staðfestir Meginfelag Teirra Brekaðu, MBF

Tað, sum felagið sipar til, er ætlanin hjá samgonguni at avtaka skipanina, har almannaveitingar automatiskt hækka 3% um árið fyri at byrgja upp fyri prísvøkstrinum í samfelagnum

Leila Solmunde, forkvinna í MBF, sigur, at tey undrast á at vælferðarsamfelagið Føroyar yvirhøvur kemur sær at leggja eitt uppskot sum hetta fram

– Samstundis, sum hetta verður gjørt, eru eisini fleiri brúkaragjøld ásett, umframt at arbeiðarafeløgini nýliga hava fingið lønarhækking.

Tvey dømi um brúkaragjøld eru, at í ávísum føri er tilskot til heilivág minkað og nú skulu fólk, sum hava brúk fyri hoyritóli, sjálvi betala 2000 krónur fyri hvørt hoyritól, ella tilsamans 4000 krónur fyri eitt sett til bæði oyruni.

– Samstundis er rákið tann vegin, at fleiri og fleiri brúkaragjøld verða áløgd.

Hon leggur afturat, at fyri fáum árum síðani varð automatiska hækkingin 4%, men so varð hon skerd niður í 3% og nú er so ætlanin at avtaka hana heilt.



**FÁTÆKRADØMI**

*Í ávísum føri liva fyritíðarpensjónistar í fátækradømi, men gera samgongan álvara av sínum nýggjastu ætlanum, verður støðan uppaftur verri, sigur Leila Solmunde, forkvinna í Meginfelagi teirra Brekaðu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Tað er undarligt, at eitt vælferðarsamfelag kemur sær at leggja eitt slíkt uppskot fram**

### Nógv verri fyri

Forkvinnan í MBF minnir á, at ein livikorskanning, sum varð gjørd í 2007, vísir, at samanborið við inntøkustøðið í føroyska samfelagnum sum heild, eru fyritíðarpensionistar fíggjarliga nógv verri fyri.

– Tað gerst ikki betur av, at størsti parturin av fyritíðarpensionistum bara fáa miðalpensión, ið er væl lægri enn ein vanlig arbeiðaraløn.

– Ein avleiðing av hesum er, at í ávísum føri kunnu livikorini hjá fyritíðarpensjónistum sammetast við fátækadømi.

Hon vísir eisini á, at sostatt eru fyritíðarpensionistar við skerdan lut á mongum økjum tá ið talan er um luttøku í føroyska samfelagnum á jøvnum føti við onnur.

– Verður hendan ætlanin sett í verk, fer hendan støðan at gerast enn verri.

Hon minnir eisini á, at í nógvum førum eru fyritíðarpensionistar í bestu árum og hava tí somu útreiðslur til rentur og avdráttir, sum aðrir føroyingar í arbeiðsførum aldri hava.

– Tí harmar tað okkum, altíð at verða sammett við fólkapensiónistar, ið eru eitt heilt annað stað í lívinum, sigur Leila Solmunde.

*aki@sosialurin.fo*

# Hetta tola pensjónistar ikki

**ÓTOLANDI** Verður ætlanin hjá samgonguni sett í verk, fara lágløntir pensjónistar at liva í lutfalsligum fátækradømi, sigur Landsfelagið hjá Pensjónistunum

Áki Bertholdsen

– Hetta tola pensjónistar ikki!

Í Landsfelagnum hjá pensjónistunum eru tey púra greið í síni meting av ætlanini hjá samgonguni at frysta pensjónirnar fastar.

Ælanin er at automatiska hækkingin upp á 3%, sum kemur oman á allar almannaveitingar um árið fyri at byrgja upp fyri príshækkingum, skal nú avtakast.

– Fólkapensjónistar, ið bert hava fólkapensjón og samhaldsfasta at liva av, tola ikki at fólkapensjónin verður fastfryst, staðfestir Ingrid Henriksen, ráðgevari hjá landsfelagnum.

Hon sigur, at politikarar eiga at leggja sær í geyma, at fólkapensjónistar hava verið fyri nógvum príshækkingum og skerjingum á eldraøkinum seinastu tvey árini.

– Sjálvsagt má fólkapensjónin tískil framhaldandi hækka í samsvari við lønar- og prísvøksturin í samfelagnum fyri at sleppa undan, at lágløntir fólkapensjónistar skulu liva í lutfalsligum fátækradømi í »vælferðarsamfelagnum« Føroyar.

### Mugu bíða

Landsfelagið hjá pensjónistunum vísir eisini á, at Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur víst á, at spurningurin um at frysta almannaveitingarnar, er tengt at úrslitinum av lønarsamráðingunum millum fíggjarmálaráðið og fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum í heyst

– Enda tær samráðingarnar við lønarhækkingum, verða almannaveitingarnar eisini hækkaðar, sigur Landsfelagið frá landsstýrismanninum.

Tey leggja afturat, at er hetta eftirfarandi, eigur Løgtingið ikki at viðgera málið um at frysta almannaveitingarnar, fyrrenn úrslitið av lønarsamráðingunum á almenna arbeiðsmarknaðinum er greitt.

Í hesum sambandi kann skoytast upp í, at Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum, hevur sagt fyri Sosialinum í vikuni, har hon hevur fingið greið boð frá samgonguni um, at útreiðslurnar til lønir og almannaveitingar skulu ikki verða hægri næsta ár, enn tær eru í dag.

Ein og hvør hækking skal sostatt takast inn aftur við sparingum aðrastaðni, sigur Rósa Samuelsen.

*aki@sosialurin.fo*

**Er Jóannes Eidesgaard eftirfarandi, eigur Løgtingið at bíða**

# Ótrygt

## Fyritíðarpensjónistar kunnu ikki fara í verkfall

Leila Solmunde, forkvinna í MBF, vísir á, at tað er serstakliga ótrygt at verða fyritíðarpensjónistur tí teir eru fullkomiliga í hondunum á politikarunum.

– Teir eru nevniliga í teirri støðu, at politiski myndugleikin hevur altíð valdið til einsamallur at skerja fíggjargrundarlagið, uttan at fyritíðarpensionisturin hevur møguleika at ávirka avgerðina.

– Fyritíðarpensjónistar hava ikki, eins og fakfeløg, rætt til samráðingar um løn annaðhvørt ár ella so, men eru fullkomiliga givnir upp til náði frá politikarum.

Leila Solmunde viðgongur, at »olmussa« er eitt orð, hon kemur í tankar um, tá ið hon hugsar um fíggjarligu støðuna og ótryggleikan, sum fyritíðarpensjónistar liva undir.

Og góðtaka fakfeløgini ikki treytirnar, hava tey altíð tann møguleikan, at tey kunnu fara í verkfall. Men tað vápnið hevur ein fyritíðarpensjónistur av eyðsýndum orsøkum heldur ikki.

– Men nettupp tí fyritíðarpensjónistar onga trygd hava, hevur tað avgerandi týdning, at tað er ein automatisk hækking í skipanini, tí hetta kann samanberast við teirra lønarhækking fyri at byrgja upp fyri príshækkingum, á sama hátt, sum fakfeløg fáa lønarhækking, sigur Leila Solmunde.

*aki@sosialurin.fo*